*framhald av síðu 13*

Nú verður so eisini arbeitt við tí triðja framleiðandi feltinum, White Rose, sum Husky Energi og Petro-Canada í felag eru við at byggja út. Ætlandi skal framleiðslan byrja í 2004. Men eisini í hesum førinum verður tosað um seinkingar. Ein orsøkin er tann, at stigtakararnir hava ikki kunnað bestemmað seg til antin tað skuldi vera ein pall ella eina skipaloysn. Endin gjørdist, at skipaloysnin verður brúkt.

Í ávísum førum ber til at flyta kjakið um oljuvinnuna í New Foundlandi beinleiðis til Føroyar. Nógvir av spurningunum, sum hava verið frammi har og verða viðgjørdir í fjølmiðlunum eru júst somu spurningar, sum oftani eru frammi í kjakinum herheima eitt nú í hvønn mun heimaídnaðurin sleppur at vera við í menningini, í hvønn mun politikararnir seta sær ov høg mál osfr.

Í oddagrein í blaðnum Uppstream 11. januar í ár verður róð framundir, at politikararnir í New Foundlandi blása og hava mjøl í munninum í senn. Um somu tíð sum teir krevja, at innlendis arbeiðsmegi og virki skulu vera veitarar, verður skundað undir at fáa framleiðslu í gongd. Men hetta hongur ikki altíð saman. Hetta eru spurningar, sum uttan iva eisini fara at merkja eitt komandi orðaskifti í Føroyum, um og tá avgjørt verður at fara undir framleiðslu frá einum lønandi felti. Í tí førinum kundi verið áhugavert at trivið í eina viðmerking í blaðnum um tilgongdina í New Foundlandi:

»It is understandable that politicians are keen to ensure that there is a high degree of local content in any particular scheme but they cannot dictate spending levels and must accept that local suppliers must be able to deliver quality on time and at reasonable cost«, skrivar blaðið men leggur aftrat, at í dag er Canada við at gerast ein týðandi oljulandslutur, tó at talan enn er um eitt øki við høgum kostnaðarstøði.

Fyrri føroyingar, sum halda seg hóma eina komandi oljuvinnu úti í havsbrúnni, kann tað hava áhuga at fylgja gongdini í øðrum økjum, sum minna um okkara og sum ikki liggja heilt so fjarskotin. Her koma fyrst og fremst oljuøkini vestan fyri Hetland, men eisini New Foundland, hvørs fiskigrunnar vit ikki eru ókend við, hava okkara áhuga, tá ein møgulig útbygging fer í gongd her hjá okkum eisini. Har hava teir longu fingið sínar fyrstu royndir við at menna tvey oljufelt, eitt nú einum palli og eitt við einum skipi. Viðurskifti, sum eisini oljuvinnan um okkara leiðir kemur at taka støðu til, tá staðfest er, um felt eru lønandi her.




*Uttan iva heilt av tilvild verða somu heitið brúkt í oljuvinnuni í Føroyum og í Kanada. Blaðið, sum umrøður oljutilgongdina í New Foundlandi hevur sama navn sum føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum. Um føroyska felagið so fer at hava líka góðan byr sum oljuvinnan hevur havt tað hinumegin Atlantshavið vil tíðin vísa. Her forsíðan á eini av útgávunum og sum vísir seg at snúgva um júst somu mál, ið eru á dagskránni í oljuorðaskiftinum her heima*




*Nógv ísfjøll koma framvið oljuøkjunum út fyri New Foundland. Tá tey eru ein hóttan fyri oljuframleiðsluna verður endi settur á og tey verða togað burtur evni verða sprænd á tey*

# Bilar

Nr. 21 • hósdagur • 31. januar 2002 • 76. árg.

**Bilatorgið** s.16 & 17

# Brot á nýggju ferðslulógina raka órættvíst!



*Einar Djurhuus, ið hevur koyrt buss í mong ár, og nú arbeiðir sum bilførari hjá Postverk Føroya, sigur, at um hann kemur at bróta ferðslulógina og harvið missa koyrikortið, er tað ikki víst, at hann og familjan hava møguleika at búgva í húsunum, tey nýliga hava latið bygt. Á myndini Majbritt og Einar við soninum Meinhard*

**Nú nýggja ferðslulógin, ið kom í gildi 1. juli 2000, hevur virkað í hálvtannað ár, vísir tað seg at nógv fólk eru komin illa fyri av hesi lóg. Einar Djurhuus og Heri Simonsen, ið starvast hjá Postverki Føroya, heita á fakfeløg og fakfelagsleiðarar um at virka fyri, at løgtingið og landsstýrið skjótast gjørligt gera tær neyðugu broytingarnar í ferðslulógini**

FERÐSLULÓGIN
*Magnus Gunnarsson*

Einar Djurhuus og Heri Simonsen gera vart við, at tað eru lógargreinarnar 23, 32 og 59 í ferðslulógini, sum fella fólk innan flestu vinnubólkar í landinum. Eisini gera teir vart við, at nýggja ferðslulógin kann raka og hevur longu rakt tey, sum hava bilkoyring sum sítt starv, sum til dømis heimahjálparar, heimasjúkrasystrar, bilførarar í vinnu, hýruvognsførarar, portørar, handverkarar, postboð, postbilførarar, almenn sett fólk við tænastubilum og enntá løgreglumenn undir arbeiði.

### Fáa sama dóm

Teir báðir, Einar Djurhuus og Heri Simonsen, føra fram, at tað mest órættvísa við hesi ferðslulógini er, at tann, sum hevur koyrt hampuligt í eitt mannaminni og kemur at gera eitt mistak í ferðsluni, ofta undir arbeiði, fær somu revsing sum tann, ið verður tikin við 150-200 km/t. Báðir fáa treytaða frádømingav koyrikortinum og eina bót fyri brotið, teir hava gjørt. Sum dømi nevna teir ein mann, sum hevur koyrt umleið 600.000 kilometrar í tænastubili í landsins tænastu. Viðkomandi kom út fyri at gera eitt lítið mistak - í arbeiðsørindum - og verður dømdur treytaða frádøming av koyrikortinum. Ein metur av teimum umleið 600.000 kilometrunum skuldi fella hann.

### Treytaða frádømingin hangandi

Hetta brotið á ferðslulógina, sum til dømis at hava brotið víkiskyldina, førir eisini við sær, at bilførarin skal upp til eina royndar, hann skal kunna svara rætt uppá megínpartin av teimum 60 spurningunum ið verða settir. Um hann ikki klárar tað, má hann upp til nýggja teori- og koyriroynd. Dømi er um, at fólk hava goldið upp til 10.000 krónur fyri at fáa koyrikortið aftur. Eftir hetta hevur bilførarin ta treytaðu frádømingina av koyrikortinum hangandi yvir sær í heili 3 ár.

### Koyrikortið er útbúgvingin

Um tey, sum ikki hava bilkoyring til sítt starv, missa koyrikortið, kunnu tey finna aðrar flutningsmøguleikar fyri at koma til arbeiðis, eitt nú at brúka bussarnar ella at tey verða koyrd til arbeiðis. Meðan tey sum hava bilkoyring til sítt starv, missa arbeiðið og harvið inntøkugrundarlagið. Fyri tey sum eru ófaklærd, er koyrikortið teirra einasta útbúgving.

### Órættvísar fylgjur

Hjá teimum sum hava koyring sum sítt livibreyð kann hetta verða ein dyggur smeitur. Tí er skriv sent út til flestu fakfeløg í landinum. Stórur partur av teirra limum hava bilkoyring sum sítt starv, og kunnu koma sera illa fyri, um tey koma at gera eitt mistak í ferðsluni. Ger onkur persónur brot á ferðslureglurnar fleiri ferðir innan eitt styttri áramál, so er ikki órímiligt við treytaðum dómi. Men, at fólk skulu straffast so hart fyrstu ferð, tey gera eitt mistak í ferðsluni, og enntá undir arbeiði, eigur ikki at fáa so órættvísar og ógvusligar fylgjur, siga teir báðir Einar Djurhuus og Heri Simonsen.




*Heri Simonsen heldur tað vera hørð revsing at missa koyrikortið treytað - ella heilt!*